# Generellar ásetingar og treytir fyri luttøku í sólorkuvitjanum - galdandi fyri vitjanir úr Føroyum eftir 1. januar 2021

Niðanfyri skrivaðu ásetingar og treytir eru galdandi fyri vitjanir frá og við 1. januar 2021, sum eru bílagdar frá og við 1. juli 2020.

---

**1. TEKNING**

Tekningin - og harvið upplýsingar og treytir, sum eru fráboðaðar á okkara heimasíðu, í brosjúrum og tílíkum kunningartilfari umframt í hesum skjali - er bindandi fyri bæði Sólorku og viðskiftafólkið, tá viðskiftafólkið hevur goldið í minsta lagi bíleggingargjaldið rættstundis. Inngjaldið merkir, at viðskiftafólkið hevur góðkent omanfyri nevndu treytirnar.

**2. MØGULIGAR BROYTINGAR Í PRÍSINUM**

Prísurin fyri ferðina er grundaður á galdandi avgjøld og valutakurs. Sólorka hevur rætt til innan fráferðardagin at gera prísbroytingar, sum standast av broytingum í flutningskostnaði (eitt nú brennievnisprísum), skattum, avgjøldum, tænastugjøldum (t.d. flogvallar-, start- ella lendingargjøldum) ella gjaldoyrakursum, sum eru brúkt til at rokna út prísin á galdandi vitjan. Hetta er eisini galdandi, hóast viðskiftafólkið hevur goldið fyri alla ferðina. Dýrkar flogvallargjaldið t.d. 100 krónur, kann Sólorka hækka samlaða prísin 100 krónur.

Hækkar prísurin á hendan hátt meira enn 10 prosent, hevur viðskiftafólkið rætt til at avlýsa vitjanina og at fáa alt inngjald sítt endurrindað. Treytin er tó, at viðskiftafólkið boðar Sólorku frá avlýsingini beint eftir, at tað er kunnað um príshækkingina.

Lækka ella falla burtur skattir ella avgjøld otl., sum verða løgd beinleiðis á Sólorku, og sum eru innroknað í prísin, hevur Sólorka skyldu til at lata hetta koma viðskiftafólkinum til góða, um so er, at lækkingin er størri enn 100 krónur fyri hvønn vitjandi.

Sólorka skal kunna viðskiftafólk um eina møguliga príshækking skjótast tilber og í seinsta lagi 20 dagar innan fráferðardagin. Hetta skal gerast umvegis teldupost til ta teldupostadressuna, sum viðskiftafólkið hevur upplýst í sambandi við tekningina ella seinni.

**3. AVLÝSING INNAN FRÁFERÐ**

<u>A. Broytingar ella avlýsingar framdar av Sólorku</u>

Sólorka hevur rætt til at broyta ella avlýsa eina uttanlandsvitjan sambært hesum treytum:

Um so er, at Sólorka innan fráferð avlýsir vitjanina, skal viðskiftafólkið kunnast um hetta skjótast tilber. Samstundis sum Sólorka kunnar viðskiftafólkið um avlýsingina, skal felagið kunna viðkomandi um, hvørji rættindi hann hevur, og hvussu hann skal bera seg at fyri at gagnnýta hesi rættindi.

Avlýsir Sólorka eina vitjan, uttan at hetta stendst av viðurskiftum hjá viðskiftafólkinum sjálvum, hevur viðskiftafólkið rætt til at fáa endurgoldið øll gjøld síni til Sólorku fyri vitjanina. Sí tó undantøk undir partinum C niðanfyri.

Sólorka hevur altíð rætt til – við afturgjaldi til viðskiftafólkið av øllum inngjøldum til felagið – at avlýsa eina vitjan, um talið á vitjandi 60 dagar undan vitjanini er lægri enn 70% av samlaða kapasitetinum umborð á ætlaða flogfarinum. Gerst hetta neyðugt, skal Sólorka kunna viðskiftafólkið í seinasta lagi 45 dagar undan ætlaðu fráferðini.

Sólorka rindar ongantíð meira aftur í endurgjaldi, enn viðskiftafólkið hevur rindað til Sólorku. Tað ber soleiðis ikki til at seta fram krav móti Sólorku fyri eitt økonomiskt tap vegna eina avlýsing.

<u>B. Avlýsing frá kundans síðu</u>

Viðskiftafólkið hevur rætt til at avlýsa vitjanina sambært niðanfyri standandi treytum, uttan so, at Sólorka longu í sambandi við upprunaligu avtaluna um vitjanina hevur kunnað viðskiftafólkið um, at ein avlýsing elvir til tap av inngjaldinum vegna viðurskifti viðv. einum ella fleiri undirveitarum (eitt nú flogfeløgum):

a) Avlýsir viðskiftafólkið vitjanina í seinasta lagi 90 dagar undan avtalaðu fráferðina, fær viðskiftafólkið afturgoldið restgjaldið, men ikki upprunaliga bíleggingargjaldið.
b) Avlýsir viðskiftafólkið seinni enn 90 dagar undan og í seinasta lagi 45 dagar undan fráferðini, hevur viðskiftafólkið rætt til at fáa endurgoldið 50 % av restgjaldinum.
c) Avlýsir viðskiftafólkið seinni enn 45 dagar undan fráferðini, ella møtir viðkomandi ov seint ella als ikki til fráferðina uttan avtalaða avlýsing, hevur viðskiftafólkið ikki rætt til nakað afturgjald. At møta ov seint ella als ikki verður roknað sum ein avlýsing.

Viðskiftafólkið kann hjá sínum tryggingarfelag tekna eina avlýsingartrygging, sum undir ávísum umstøðum tryggjar viðskiftafólkinum eitt endurgjald frá tryggingarfelagnum í sambandi við, at viðkomandi avlýsir. Vit mæla staðiliga øllum til at tekna bæði ferðatrygging og avlýsingartrygging og samstundis at kunna seg væl um viðkomandi treytir, rættindi o.a. hjá tryggingarfelagnum.

Viðskiftafólkið kann lata ella selja øðrum persóni vitjanina (fremja navnabroyting), um hesin persónurin annars lýkur treytirnar fyri at vitja Sólorku. Í andsøgn til nógvar aðrar fyritøkur, krevur Sólorka ikki broytingargjald, uttan so, at tað verður kravt av onkrum undirveitara. Bæði gevandi/seljandi og móttakandi/keypandi viðskiftafólkini hefta mótvegis Sólorku fyri, at bíleggingargjald og/ella restgjald verða goldin rættstundis. Vit mæla báðum pørtum til at avgreiða síni tryggingarviðurskifti í hesum sambandi. Gev gætur, at eftir kravi frá flogfeløgum er eitt evstamark fyri møguleikanum at gera navnabroyting. Sólorka kann kunna um tílíkt evstamark í hvørjum einstøkum føri.

<u>C. Avlýsingar, sum ikki standast av kundans ávum, men sum Sólorku onga ávirkan hevur á</u>

Av tí at Føroyar ikki eins og grannalondini hava nakra lóg, sum regulerar sonevndar pakkaferðir og soleiðis heldur einki lógargrundarlag undir eini ferðatrygd (rejsegaranti), eru fólk, sum ferðast úr Føroyum út í heim at njóta pakkavitjanir, ikki eins væl vard móti eitt nú húsagangi í ferðavinnuni, sum vitjandi úr grannalondunum. Hetta verður tíverri endurspeglað í viðskiftatreytum hjá føroyskum ferðaskrivstovum, ferðasmiðjum og tílíkum fyritøkum. Talan er um eitt mál, sum eina og aleina kann verða broytt frá politiskari síðu.

Vegna vantandi føroyska ferðatrygd (rejsegaranti) kann ikki veitast full vissa fyri, at viðskiftafólk fáa fult ella partvíst endurgjald, um ein vitjan verður avlýst vegna orsøkir, sum Sólorka onga ávirkan hevur á – eitt nú fyri gjøld, sum Sólorka hevur rindað víðari til undirveitarar, og sum hesir antin ikki megna ella vilja afturrinda orsakað av húsagangi ella aðrari grund.

Sólorka strembar tó eftir at tryggja sínar gestir so væl, sum tilber. Hetta gera vit við m.a. (1) eini konservativari fíggjarstýring; og (2) einum gjølliga umhugsaðum vali av samstarvsfeløgum. Vit miðja eftir bert at samstarva við nakrar fáar sterkar undirveitarar, teirra millum Atlantic Airways.

Sólorka er limur í danska Rejsegarantifonden, men hendan trygdin tekur bert við í sambandi við eitt nú húsagangir í vinnuni, tá talan er um gestir frá danska marknaðinum, sum ferðast úr og heimaftur til Danmarkar. Somuleiðis brúkar enska dótturfelag okkara trygdarskipanir, sum galda á bretska marknaðinum.

**4. SKYLDUR OG ÁBYRGDIR HJÁ SÓLORKU UNDIR VITJANINI**

Sólorka hevur skyldu til at útinna vitjanir og veita tær tænastur, sum verða lýstar í almenna tilfarinum hjá felagnum, sambært teimum treytum, sum verða lýstar í hesum skjali. Av tí, at Sólorka veitir so umfatandi tænastur við nógvum staktáttum, sum harafturat verða almannakunngjørdar nokkso langt frammanundan vitjanunum, hevur Sólorka uttan endurgjaldsskyldu rætt til at gera ávísar broytingar í innihaldinum, treytað av, at hesar ikki kunnu metast at minka munandi um virðið á samlaða tilboðnum.

Sólorka kann ikki ábyrgdast fyri viðurskifti, sum felagið av sjálvsagdum orsøkum ikki hevur tamarhald á – eitt nú, um veður og hiti víkja frá tí, sum er vanligt á vitjunarstaðnum. Heldur ikki kann felagið ábyrgdast fyri viðurskifti, sum í mestan mun standast av forsømilsi frá viðskiftafólksins síðu.

Víkir ein vitjan munandi frá tí, sum er upplýst um hana frammanundan, á ein hátt sum má metast at minka um virðið á henni, hevur Sólorka bæði rætt og skyldu til at fáa minkað um munin skjótast tilber. Viðskiftafólkið hevur tí skyldu til at boða Sólorku frá alt fyri eitt og á staðnum, um okkurt er, sum viðkomandi er misnøgdur um. Sí brotið um 'Kunning og klagur um ónøgd' niðanfyri.

Elvir ein mangul í tænastunum frá Sólorku til eitt beinleiðis økonomiskt tap hjá tí vitjandi, hevur hesin rætt til endurgjald frá Sólorku, uttan so, at mangulin stendst av óviðkomandi triðjaparti og ikki við hóskandi skygni kundi verið væntaður, tá vitjanin varð avtalað, ella undansloppin við atgerð frá Sólorku ella onkrum, sum Sólorka hevur ábyrgdina av. Sólorka kann heldur ikki ábyrgdast, um ein avlýsing ella manglandi útinning stendst av umstøðum uttaneftir, sum Sólorka, ella onkur, sum Sólorka hevur ábyrgdina av, ikki við hóskandi skygni ella nærlagni kundi væntað ella sloppið undan (force majeure).

Endurgjald fyri perssónsskaða ella skaða á viðføri er avmarkað í samsvari við reglurnar í altjóða konventiónum. Viðv. flogferðslu í hesum høpi verður víst til brotið um flogferðslu niðanfyri.

Allar fráferðar- og komutíðir, sum verða lýstar í almenna tilfarinum hjá Sólorku, skulu metast sum vegleiðandi og væntandi. Sólorka kann ikki ábyrgdast fyri miss, sum stendst av frávikum frá hesum tíðum, uttan so at frávikini kunnu metast at vera so munandi, at vegleiðandi tíðirnar kunnu metast sum beinleiðis villeiðandi.

Sólorka rindar ikki endurgjald fyri bágar og ampa, sum standast av veitingarsliti á gistingarhúsum – herundir fyribilssliti av eitt nú heitum vatni, hita og 'aircondition'. Heldur ikki verður endurgjald rindað, um svimjihyljar og aðrir hentleikar eru fyribils stongd vegna umvæling ella viðlíkahald. Sólorka sigur eisini frá sær alla ábyrgd av upplýsingum, sum undirveitarar felagsins leggja fram í sínum egna tilfari, og sum Sólorka ikki endurgevur beinleiðis í sínum tilfari.

Tann vitjandi hevur sjálvur ábyrgd av øllum virðislutum og pengum sínum undir vitjanini. Sólorka tekur ikki ábyrgd av virðislutum, um hesir hvørva frá goymsluboksum ella øðrum goymslum.

**5. ÁBYRGDIR HJÁ FLOGFELØGUM**

Viðv. ábyrgdum og treytum hjá flogfeløgum, sum Sólorka samstarvar við, verður víst til tær upplýsingar, sum flogfeløgini sjálv kunngera, eitt nú á heimasíðum sínum.

## 6. SKYLDUR OG ÁBYRGDIR HJÁ TÍ VITJANDI (VIÐSKIFTAFÓLKINUM)

Tann vitjandi hevur skyldu til at fylgja teimum boðum og vegleiðingum fyri vitjanina, sum Sólorka ella eitt umboð fyri felagið eins væl og flogfelagið áseta. Hann skal eisini virða tær reglur, sum eru galdandi fyri flutning til og frá vitjunarstaðnum eins væl og gisting á hotellinum. Grov ella afturvendandi brot á reglurnar kunnu elva til burturvísing frá flogfari, bussi ella hotelli við tí úrsliti, at tann vitjandi sjálvur má fáa til vega annan gistingarmøguleika og heimferð fyri egna rokning.

Tann vitjandi skal vera førur fyri at ansa eftir sær sjálvum ella vitja saman við einum øðrum persóni, sum kann stuðla, um hetta er neyðugt. Tann vitjandi hevur endurgjaldsskyldu í samsvari við vanligar reglur fyri tílíka skyldu, um hann ger skaða á ognir hjá øðrum vitjandi, Sólorku, starvsfólkum, flogfelag, hotelli o.ø.

Tann vitjandi hevur ábyrgd av at hava galdandi pass eins væl og visum og skjalprógv fyri koppsetingum, um hesi eru kravd. Sólorka hevur onga ábyrgd av persónsupplýsingunum hjá teimum vitjandi og kann tí ikki verða møtt við krøvum, sum standast av skeivum, vantandi ella ófullfíggjaðum upplýsingum.

Útlendskir ríkisborgarar og tey, sum hava danskt fremmandapass, kunnu kunna seg hjá viðkomandi sendistovu og hjá danska serumstovninum um, hvørt teimum tørvar visum ella serligar koppsetingar. Sólorka kann ikki ábyrgdast fyri útreiðslur, sum standast av, at tey vitjandi ikki hava kunnað seg til fulnar.

Tann vitjandi má sjálvur rinda tær møguligu eykaútreiðslur, sum kunnu standast av manglum í omanfyri nevndu formalitetum, eitt nú fyri flutning heim sum úrslit av manglandi passi, uttan so, at mangulin stendst av skeivari upplýsing frá Sólorku.

Tann vitjandi hevur somuleiðis ábyrgdina av møguligum avleiðingum av sjúku, vanlukku otl. undir vitjanini, og tann vitjandi má sjálvur rinda fyri læknahjálp, uppihaldi á sjúkrahúsi, serflutning heim otl. Tað er tó lætt at tekna eina ferðatrygging móti hesum, og Sólorka mælir staðiliga øllum gestum sínum at gera tað.

Tann vitjandi skal kunna seg hjá umboðum fyri Sólorku og/ella á plakatum um heimferðartíðir, herundir eisini um møguligar broytingar av hesum tíðum. Sólorka mælir øllum gestum sínum at seta seg í samband við umboð fyri felagið á staðnum 24 tímar undan heimferð fyri at fáa heimaferðartíðina váttaða.

Um so er, at eitt viðskiftafólk ikki møtir rættstundis til fráferðina úr Føroyum uttan frammanundan at hava gjørt avtalu um hetta við Sólorku, missir tað rættin til heimferðina.

Møtir tann vitjandi ikki rættstundis til heimferðina, missir hann rættin til hana og má sjálvur fáa til vega heimferð fyri egna rokning. Sólorka hevur heldur onga ábyrgd av, at tann vitjandi skrivar seg inn til heimferðina í útlendsku floghavnina í tøkum tíma, um viðkomandi velur egnan flutning og ikki felagsflutningin hjá Sólorku til floghavnina.

Viðskiftafólkið hevur ábyrgdina av, at viðkomandi sjálvur eins væl og viðførið hjá honum er egnað til flogferðir ella bussflutning. Sólorka minnir á, at kvinnur, sum eru við barn í áttanda ella níggjunda mánað, ikki mugu ferðast við flogfari.

Flogskiparin/bussførarin kann gera av at vísa einum persóni burtur, sum hann metir at vera ógnaðan til flutningin ella til ampa fyri onnur ferðandi vegna sjúku, rús ella aðra orsøk.

Sólorka rindar ikki endurgjald fyri møguligar partar av eini vitjan, sum tann vitjandi ikki møtir til ella brúkar.

## 7. KUNNING OG KLAGUR UM ÓNØGD

Møguligar klagur um tænastuna hjá Sólorku undir eini vitjan, skulu verða latnar umboðum hjá Sólorku á staðnum so títt og knapt, tann vitjandi hevur uppdagað manglarnar í tænastuni, so Sólorka fær ein møguleika at taka stig til at bøta um tað, sum klagað verður um.

Tað ber ikki til at boða frá misnøgd og/ella krevja endurgjald eftir vitjanina, tá Sólorka ikki longur fær bøtt um tænastuna. Tann vitjandi missir tó ikki hendan rættin at klaga eftirsíðani, um Sólorka hevur víst groft ósketni og/ella ein óheiðurligan atburð.

Klagur um feilir ella manglar, sum tað ikki hevur borið til at rætta á staðnum, skulu verða latnar Sólorku skrivliga í seinasta lagi 4 vikur eftir, at vitjanin er endað.

## 8. TRYGGING / SJÚKA / STULDUR

Tá tú ferðast uttanlands, hevur tað stóran týdning, at tú hevur eina trygging, sum eisini er galdandi í tí landi, sum tú vitjar. Tað liggur á tí vitjandi sjálvum at fáa hendur á skjalprógvum á staðnum fyri møguliga sjúku, skaðar ella stuldur. Eftir heimkomuna kann tað vera sera trupult at fáa politifrágreiðingar, læknaváttanir ella annað skjalprógv. Umboðini hjá Sólorku á staðnum eru tó altíð til reiðar at hjálpa, um tey verða kunnað um trupulleikarnar í tøkum tíma.

## 9. "EIGARIN" AV VITJANINI

Tann persónurin, sum er skrivaður sum nummar 1 til vitjanina, ella tann persónurin, sum váttanir og rokningar skulu sendast til umvegis eitt nú teldupost, verður roknaður sum "eigarin" av vitjanini. Bert hesin persónurin kann broyta og/ella avlýsa vitjanina. Bíleggur hesin persónurin vegna fleiri, verður hann at rokna sum "eigarin" av øllum bíleggingarváttanunum.

--

**GG! Vit taka fyrivarni fyri prentvillum.**
*28. juni 2020*